## 1. Føgur er foldin.

1. Føgur er foldin,
dýrdarríkur himin,
sæl er sálanna jorsalferð,
um allan heimin,
um allar ævir
tað syngjandi at himni ber.

2. Øldirnar fara,
øldir munnu koma,
ætt eftir ætt søkkur undir mold.
Onga tíð tagnar
ljóðið av himni,
sum gleðir sálir her á fold.

3. Einglar tað kvóðu
jólanátt for hirðum,
mann eftir mann hoyrdist sama lag:
Friður á foldum, menniskja frø teg,
tær føddur frelsari er í dag.

Orð: Bernhard Severin Ingemann
Lag: Slesiskt lag
Týtt: Jákup Dahl

## 2. Gleðilig jól

1 Gleðilig jól! Gleðilig jól!
ljóðar av himli einglalag.
Armi syndari, óttast ei nú,
gleðiboðskapin hoyrir tú:
:,: Jesus er føddur í dag. :,:

2. Faðir vár! Faðir vár!
Høgt tó tú á himli býrt,
ikki gloymdi tú barnið títt,
elskaði syndiga hjarta mítt;
:,: veri um ævi tær dýrd. :,:

3. Frelsari mín! Frelsari mín!
Náði tín hon er mítt skjól.
Paradísportrið er opnað mær,
aldri kann eg fulltakka tær
:,: fyri gleðilig jól. :,:

Orð: Friðrikur Petersen
Lag: Franz Xaver Gruber

## 3. Eg gleðist so hvørt jólakvøld

1. Eg gleðist so hvørt jólakvøld,
tí Jesus føddist tá,
tá lýsti stjørnan sum ein sól,
lag sungu einglar tá.

2. Og lítla barn í Betlehem,
tað var ein kongur bold',
sum kom av høgu himnaborg
á hesa neyðar fold.

3. Nú hann í himmiríki býr,
tí hann Guðs sonur er;
men altíð hoyrir hann hvønn tann,
í bøn til hansar fer.

4. Eg gleðist so hvørt jólakvøld,
vit syngja honum prís,
tá øllum smáum opnar hann
sítt sæla paradís.

5. Og móðir tendrar tá øll ljós,
tey skína í hvønn krók,
tí út um heimin, sigur hon,
at lýsa stjørnan tók.

6. Hon sigur, stjørnan lýsir enn
og aldri slokna kann,
og um hon lýsti mær á veg,
tá heim til Guðs eg fann.

7. Hon sigur, at hitt einglaljóð
tað ljóðar enn í dag
um frið og gleði her á jørð
og um Guðs hjartalag.

8. O, gævi eg kundi sungið so,
tá gleddist Jesu lund;
tí eg við varð Guðs kæra barn
á halgu skírnarstund.

9. Eg gleði meg hvørt jólakvøld
um Harran Jesus Krist.
At hann av sonnum elskar meg,
tað veit eg fult og vist.

Orð: Marie Wexelsen
Lag: Hans Jacob Højgaard
Týtt: Jákup Dahl

**4. Í Betlehem, í Dávids stað**

1. Í Betlehem, í Dávids stað
har birtist ljós til kláran dag;
tað lýsti yvir myrku vrá,
og hirðar mundu undur sjá,

2. Og himnaljósið skein so bjart,
so alt varð ljóst, sum fyrr var svart.
Har einglar sungu jólaboð.
Lær, Jesus, meg at syngja so.

3. Tað ljómaði so milt og søtt:
»Maria hevur Jesus føtt!«
Har hirðar hoyrdu einglasong
um miðjunátt á grønu ong.

4. Tey gleðiboð frá himna høll
bar einglaskarin vítt um vøll;
um náðiboð úr Dávids stað
tí syngja vit enn hjartans glað.

5. Um jólaboð úr Dávids bý
vit syngja nú við tungum ný'
tað, einglar áður sungu út:
»Lov, tøkk og prís tær veri, Gud!«

Yrkjari: Simon M. Zachariasen.

**5.Rudolf**
Kenna tit lítla Rudolf?
Hann sum hevði reyðan tút.
Hann var eitt lítið reinsdjór,
Og hann sá so fittur út,

Øll onnur reinsdjór flentu,
Eftir hansar' reyðu nøs,
hann vildi burt seg krógva,
tók uppá seg brillugløs.

Men so eina jólanátt,
Mjørkin tjúkkur var,
Rópti jólanissan "hjálp!",
Rudolf kom og lýs fyri mær.

Rudolfsa nøs hon lýsti,
Líka sum ein lummalykt,
Og jólanissu vísti,
heim til hús so trygt

**6. Lítla fitta nissa mín**
Lítla fitta nissa mín,
Tú skalt fáa greyt í trygil tín.
Jólagreyt við mandlu í,
Ja, so oysa vit uppí

Mandlan melur bert í kring,
Melur runt í greytinum í ring,
Hvar man mandlan vera nú,
Nissa mín hvat heldur tú?

Orð: Alexandur Kristiansen
Lag: Gerd Gøssel

**7. Hví man tað vera so hugnaligt í kvøld**

Hví man alt vera so hugnaligt í kvøld ?
Frosturin bítur, men eingi eru køld.
Dagur var strævin, men eingi sýnast móð,
hví eru øll so blíð og fróð?

Niðurlag: Tað er jólaaftan ! Klokka ring!
Bing, bang, bing ! Bing, bang, bing !
Brátt er træið tendrað - slá so ring,
Dansa, kvøð og syng.

Myrkt er og kalt er og følnað hvør urt,
sólin hin bleika næstan kámast burt,
smáfuglar stirdir ei orka á flog -
tá sendir sólin hesi gleðiboð.

Fjart er hon stødd, men vit hoyra tað ljóð,
børn síni minnist sólarmamman góð:
eg komi aftur til alt tað, sum grør
og andar á tí køldu jørð.

Børn eru børn, og tað verða vit við,
tá vit um jóklatræið lið um lið,
dansa og minnast á summar og sól,
meðan vit kvøða hátt um jól.